# Eystur Kommuna

## Lærarastarv í Leirvíkar skúla

**Ein av lærarum okkara fer í farloyvi hálvan februar. Vit søkja tí:**

1 lærara í tíðaravmarkað starv í tíðarskeiðnum hálvan februar til 30. juni 2009.

Starvið er 20 t/v

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi.
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum.
- Er stundisligur og nærlagdur

**Starvið inniber hesi øki:**
- Føroyskt í 3. flokki
- Føroyskt í 1. flokki
- Heimstaðarlæru í 3. flokki
- Ítrótt og svimjing í 3. og 1. flokki
- Flokslærari í 3. flokki

Møguliga verður onkur av lærugreinunum broytt í sambandi við setanina.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastarvið, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum. **Onnur eru eisini vælkomin at søkja.**

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1-29.2

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera 1. læraranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 16. januar kl. 18.00**
**Samognarbøur 4**
**520 Leirvík**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Fríðfinn Johnsson, 1. lærara, á tlf. 743234 ella 443234 . Eisini ber til at senda teldupost til 1. læraran: fridfinnur.johnsson@skulin.fo

Leirvíkar skúli hevur 87 næmingar í 7 flokkum. Við skúlan starvast 10 lærarar, 2 stuðlar, og reingerðingarfólk.

Vit arbeiða alsamt við menning skúlans.

Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.skulin.fo/lei

**Leirvíkar skúli**
Samognarbøur 4
520 Leirvík
Tlf. 443234

# ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN

Eldri maður søkir íbúð í Tórshavn frá 1. februar

Eri friðarligur og fari væl um

**Ring á tlf. 22 00 22**

SUNDA KOMMUNA

## Pedagogar til Dagstovnin á Flatinum

**Vit søkja eftir pedagogum til:**
- **vøggustovuna Ennið við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár**
- **barnagarðsstovurnar á Mýru og á Túvu við 20 børnum í aldrinum 3-5 ár**
- **Frítíðarstovuna á Bakka, við 24 børnum úr 2. og 3. flokki.**

**at byrja 1 februar ella eftir nærri avtalu. Størvini eru 30 – 40 t um vikuna og arbeiðstíðin er ímillum 7.15 og 17.15. Tó er starvið á Bakka 20 t og arbeiðstíðin er fyri tað mesta seinnapartar.**

**Vit ynskja**
- at tú kanst skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum,
- at tú kanst taka ábyrgd og virka í góðum samstarvi við starvsfelagaðar og foreldur
- at tú sært møguleikar og avbjóðingar, fram um mørk
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvið

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan galdandi og har tú saman við dugnaligum pedagogum og hjálparfólkum ert við til at víðarimenna tað pedagogiska umhvørvi á einum stovni har karmarnir eru sera góðir.

**Setanarviðurskifti:** Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið á lønarstigi 11 – 18.

Um ongin pedagogur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

**Meira fæst at vita:** um størvini við at tosa við Rosu Prestá leiðara á tlf 737247 ella Sólrún Dam varaleiðara á tlf 737244

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15 januar 08 og sendast til

**Dagstovnurin á Flatinum**
Skúlavegur 9
400 Oyrarbakka

**Um stovnin:**
Vit eru um 100 børn í aldrinum 0 – 10 ár og 25 starvsfólk. Stovnurin er skipaðar í 2 vøggustovur, 2 barnagarðsstovur 1 kombinerað barnagarðs/frítíðarstova og 1 frítíðarstova. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar bæði innan og uttandura, hvør barnastova er ein sjálvstøðug vælútgjørd eind, umframt eitt stórt felagsrúm, viðtaluhølið, serstova og ymisk verkstøð. Økið uttanfyri er stórt við nógvum møguleikum, og stovnurin liggur sera væl fyri t.d. beint við haga og fjøru, við skúla, fimleikarahøll, svimjihøll og góðum busssambandi

# ZARTEC.NET
Timburarbeiði

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# PHD-SKEIÐ
## Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA - várið 2009
## HEITI: HAV OG VEÐURLAG

**Lestrarstig**
7,5 ECTS

**Upptøkukrav**
Bachelor heiti í náttúruvísind (ella samsvarandi)

**Endamál**
At geva eina breiða lýsing av tí leikluti, sum havið hevur í veðurlagsskipanini; hvussu havið verður ávirkað av náttúrligum og mannaelvdum veðurlagsbroytingum, og hvussu tað er við til at gera og ávirka hesar broytingar.

**Ábyrgd av phd-skeiðnum**
Bogi Hansen, professari við Fróðskaparsetur Føroya

**Skeiðsstað**
Fróðskaparsetur Føroya, Náttúruvísindadeildin, Nóatún 3, 100 Tórshavn

**Skeiðsbyrjan**
Vika 5/2009

**Evni**
Skeiðið verður skipað eftir bókini “The oceans and climate” hjá Grant Bigg, men verður útbygt við brotum úr IPCC frágreiðingini frá 2007 og vísindaligum ritgerðum. Viðgerðin er heimsumfatandi, men við serligum denti á havleiðirnar kring Føroyar.

**Innihald:** Veðurlagsskipanin, sambandið millum hav og luft, havsúrgan, ENSO, NAO, AMO, AO, havið og náttúrligar veðurlagsbroytingar, havleiðirnar kring Føroyar í veðurlagshøpi, termohalint rák og veðurlag, rákini tvørtur um Grønland-Skotlands ryggin, Arktis, náttúrlig og mannaelvd ávirkan á veðurlagið, komandi veðurlag.

**Undirvísing**
60 fyrilestrar + umrøða av frágreiðingum og framløgum.

**Døming**
Skeiðið verður mett sum *Staðið* ella *Ikki staðið*. Tvær ferðir undir skeiðnum og eina ferð aftaná lata tey lesandi inn frágreiðingar og hava eina framløgu um uppgivin evni. Verða hesi øll góðkend, er skeiðið staðið.

**Arbeiði**
Tey lesandi mugu rokna við at brúka 200 tímar (íroknað fyrilestrar, frágreiðingar, framløgur og fyrireiking).

**Tilmelding**
Tilmelding á setur@setur.fo áðrenn 20. januar 2009 (Tikin útbúgving skal upplýsast).

Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa á Setursskrivstovuni. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo